tíðindablaðið
# sosialurin
Nr. 52 mikudagur 15. mars 1995 | 69. árgangur | Krónur 7,00



## Nýggjur stjóri á Brunatrygg-ingini
síða 4

## Tólv hava søkt starvið sum rúsdrekkaráð-gevar
síða 6

## Føroya Spari-kassi nýtt búmerki
síða 20

## Ellivu nýggir fótbóltsdóm-arar
síða 14

*AMERIKANSKT OLJUFELAG VÓNSVIKIÐ:*

# Fann onga olju við markið



*Eydnan var ikki við Amerada Hess, ti boripallurin fann onga olju*

síða 7

**UM DANSKA STJÓRNIN IKKI HEVÐI ENDURFÍGGJAÐ LÁN:**

# Landskassin av við eina milliard í ár

*Hóast lógaruppskotið um vinnuligan fiskiskap ikki júst er eftir donskum høvdi, hevur danska stjórnin lovað at endurfíggjað 435 milliónir krónur stóra uttanlandslánið, ið fellur til gjaldingar í dag. Somuleiðis hevur danska stjórnin bundið seg til at endurfíggjað uttanlandslán upp á hálva milliard, ið fella til gjaldingar seinni í ár*

síða 3

# Nú gekk alt upp á stás...

*Eydnan var ikki við Amerada Hess í síðstu viku, tí boripallurin »Dyvi Stena« kom ikki fram á olju í Schiehallion-økinum, sum annars var væntað*



*Bladmadurin á Press and Journal, Geremy Cresswell, sum oftani hevur tíðindini um olju ella onga olju langt áðrenn tað kemur alment fram frá feløgunum. Mynd jan*



Birgir Christiansen

**ABERDEEN**

**14. mars 1995**

Sambært grein í Press & Journal í gjár er greitt, at boripallurin kom fram á sand, ið annars bendir á at olja er tilstaðar, men so var ikki í hesum førinum. Bert ferilin av olju var í sandinum.

Hetta kom illa við hjá Amerada Hess, og kanska uppaftur verri hjá samstarvsfelagnum BP, ið ætlar sær at fara undir at bora ein brunn nakrar kilometrar í ein útsynning úr turra brunninum hjá Amerada Hess í blokki 204/25b. Boripallurin »Henry Goodrich« er á staðnum, men í løtuni viðrar ikki at byrja boringina.

Ábendingarnar eru nú, at Schiehallion-økið er minni enn væntað, men Amerada Hess hevði í fyrrakvøldið ongar viðmerkingar. Allarhelst verður Amerada Hess noytt at meta umaftur um støðuna á goymslunum í økinum og hetta kann fáa avleiðingar fyri ætlaða samstarvið við BP.

BP fann Schiehallion-økið í 1993, men Amerada Hess kom framá hvat skuldi vísa seg at vera ein longing av økinum í fjør. Tann 7. februar kunngjørdu feløgini so teirra samstarvsætlanir. BP hevur mett, at millum 250 og 500 milliónir tunnur eru í økinum. Ikki er greitt um hesi tøl umfata partin hjá Amerada Hess.

Boripallurin »Dyvi Stena« var ikki leingi á staðnum, tí oljan í Schiehallion-økinum liggur bert millum 1800 og 2400 metrar undir havbotninum. Farið varð undir at bora tíðliga í februar og boripallurin er framvegis á staðnum.

Amerada Hess ætlaði sær at byggja eina betri mynd av økinum við at bora metingarbrunnar í ár, orsakað av at tíðindini í fjørheyst um olju í brunni 204/25a-2 vístu seg at vera áðurnevnda longing av Schiehallion-økinum.

Hóast einki spurdist burturúr hesuferð, so eru vónirnar framvegis tilstaðar. Keldur siga, at tað tykist sum um eitt brot gongur eystur- og vestureftir gjøgnum blokkin, og at tað er møguligt at Amerada Hess finnur oljuberandi sandin aftur, um bora verður í ein landsynning.

– Tað verður áhugavert at síggja hvussu leikur fer, sigur ein eygleiðari innan ídnaðin. – Fer Amerada Hess at royna aftur í Schiehallion-økinum ella fer felagið at royna nakað meiri trygt og halda fram við at bora í Solan/Strathmore-økinum sunnanfyri, er stóri spurningurin í løtuni.

Norman Smith frá Smith Rea Energy Analysts hevði ikki frætt um misseydnaðu boriroyndina, men segði, at um tíðindini vóru sonn, so boðaðu tey ikki frá góðum. Víðari segði hann, at slíkt kann væntast, tá leitað verður eftir olju á nýggjum leiðum. Slíkum slepst ikki undan og tað hoyrir til.

Eitt annar brunnur er nú vorðin staðfestur sum »turrur«. Hetta er ein brunnur, ið Arco boraði við boripallinum »Borgny Dolphin« í august og september í fjør í blokki 205/20. Arco hevur ikki kunngjørt nakað sum helst viðvíkjandi brunninum, men Press & Journal er viðagitið fyri at fáa upplýsingar til vega. Keldur innan ídnaðin høvdu frá fyrstan tíð lítið álit á júst hesum brunninum, so tíðindini komu ikki óvart á.



*Boripallurin Dyvi Stena, sum onga olju fann, har roknað varð við at finna olju. Hóast einki spurdist burtur úr hesaferð, so eru vónirnar framvegis tilsteðar siga keldur við Press and Journal*



*Heldur ikki boripallurin Borgny Dolphin, sum hevur borað fyri oljufelagið Arco, fann olju, har hann í fjør boraði í blokki 205*




*Ikki gekst sum ætlað hjá Amerada Hess í Schihallionøkinum*

**Undirhúsið á Argjum**

**TØKK**

*Øllum tykkum, sum so dyggiliga tóku undir við kokutombola at stuðla Undirhúsið á Argjum, við takka vit hjartaliga.*

Nevndin

**SILD KLAKSVÍK**

eisini frítt heimkoyrd friggjadag

**FEIT ÍSL. SILD (5 kg spannir)**

| | |
|---|---|
| Saltsildafløk | 200,- |
| Kryddsildafløk | 220,- |
| Saltsild/stór | 150,- |
| Krydd/stór | 150,- |

Verður koyrd til hús í Havn og send við Strandferðsluni út á bygd

**SILDAGOYMSLA**

Stoffalág 17

Tlf. 12355 (kl. 10–15)